# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð

# Bygdarráðsfundur tann 19. november 2025, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Møtt á fundi:** | **Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Símun Jákup Højsted, Karl A. Olsen, Janus Jensen, Jákup Jóanesarson, Pauli Magnussen** |
| **Skrivari:** | **Sólvit Nolsø** |

Sámal Joensen, fíggjarleiðari, var við á fundinum.

Fundurin byrjaði 17:07

**Viðgjørt á almennum fundi:**

**Mál 76: Reglugerð fyri Spælhúsið**
Trivnaðarnevndin hevur viðgjørt málið um reglugerð til Spælhúsið, ið skipar nýtsluna av húsinum.
Nevndin er ikki á einum máli, men hevur latið tvey tilmæli til bygdarráðið at taka støðu til.
Anja Haldansen hevur lagt eitt tilmæli fram og Jákup S. Jóanesarson og Karl A. Olsen eitt.

Meginmunurin á uppskotunum er, at í tilmælinum hjá Anju Haldansen eru sølutiltøk og útleiga av húsunum loyvd, meðan Jákup S. Jóanesarson og Karl A. Olsen mæla til, at sølutiltøk einans eru loyvd í serligum førum, t.d. tá framsýningar og tiltøk annars eru í húsinum, og at útleigan er ikki loyvd.

**Viðv. 76**
Atkvøtt var um uppskotini. Uppskotið hjá Anju Haldansen fekk tríggjar atkvøður. Anja Haldansen, Sára Jógvansdóttir og Janus Jensen atkvøddu fyri. Uppskotið hjá Jákup Jóanesarson og Karl A. Olsen fekk fýra atkvøður. Jákup Jóanesarson, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen og Símun Jákup Højsted atkvøddu fyri. Reglugerðin, ið Jákup Jóanesarson og Karl A. Olsen løgdu fram, er samtykt.

**Mál 77: Broyting í stuðulspolitikkinum**
Umsitingin mælir til, at stuðulspolitikkurin hjá kommununi verður broyttur.
Endamálið við broytingini er at fáa stuðulsumsóknir inn umvegis Vangan, so allar umsóknir fáa somu viðgerð. Onnur broyting, sum er skotin upp er, at um søkt verður um smærri upphæddir, kunnu tær viðgerast umsitingarliga.
Fíggjarnevndin tók undir við ætlanini, men mælti til, at latið var upp fyri, at mann skal hjálpa teimum, sum ikki duga at søkja við Vanganum

**Viðv. 77**
Uppskotið frá umsitingini var einmælt samtykt.

**Mál 78: Umsókn um byggiloyvi til skúlan**
Í sambandi við umbyggingina av skúlanum hevur Eyðun Eliasen sent kommununi eina umsókn um byggiloyvi.
Tekniska deild hjá kommununi hevur lagt eitt tilmæli við. Mælt er til at ganga umsóknini á møti, umframt at viðmerkingar frá Einari Brimnes, byggiráðgeva, eru tiknar til eftirtektar.

**Viðv. 78**
Tað var einmælt samtykt at ganga umsóknini og tilmælinum hjá teknisku deild á møti.

## Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 19. november 2025, kl. 17.00

**Møtt á fundi:** **Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Símun Jákup Højsted, Karl A. Olsen, Janus Jensen, Jákup Jóanesarson, Pauli Magnussen**

**Skrivari:** **Sólvit Nolsø**

---

**Mál 79: 2. viðgerð av eykajáttan**
Í j.nr. 431002-2-2023 útbygging av kirkjugarðinum á Knúgvum, var í eykajáttan tann 10. september samtykt at framflyta tríggjar milliónir krónur til 2025, so øll verkætlanin bleiv goldin í ár.
Ein partur av verkætlanini verður tó ikki liðugur í ár hóast alt. Millum annað nakrar gøtur og mold, sum má leggjast umaftur, tí ein partur er sjúnkaður. Tað skal gerast í mars 2026. Arbeiðstakararnir meta, at arbeiðið næsta ár kostar umleið eina millión krónur.
Umsitingin mælir bygdarráðnum til í eykajáttan at flyta eina millión krónur frá verkætlanini í 2025 og aftur til 2026, tá arbeiðið gerst endaliga liðugt.
Samtykkir bygdarráðið tilmælið, broytist úrslitið í FÆ26 samvarandi eykajáttanini.
Vestmanna bygdarráð viðgjørdi málið fyrstu ferð á fundi 29. oktober 2025, og samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum frá umsitingini.

**Viðv. 79**
Einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 80: Fíggjarætlan 2026**
Fíggjarætlan 2026 var fyrstu ferð viðgjørd á bygdarráðsfundi 29. oktober, og var einmælt samtykt.
Viðløgd nú eru eisini ynskini frá brandstøðini, sum av misgáum ikki vóru við til upprunaligu viðgerðina.
Umsitingin mælir til eina umraðfesting. Tað eru tær 200.000 krónurnar, sum vóru settar av til ein bil til umsitingina, sum skulu umraðfestast. 100.000 krónur skulu brúkast til umvæling av pumpuni á brandbilinum, og 50.000 krónur skulu brúkast til ein bátavogn til bjargingarbátin. 50.000 krónur fara til at bøta um úrslitið á FÆ26.
Sára Jógvansdóttir skeyt eisini upp, at broyta heitið á játtanini upp á 1.6 millión krónur til breiðkan av vegi út á Grønanes til 'Breiðkan av vegi til Niðaraveg, Gerðisveg og Grønanes.

**Viðv. 80**
Fíggjarætlanin var einmælt samtykt við einum væntaðum halli upp á 21 milliónir krónur, tá lánið til umbyggingina av skúlanum er tikið við.
Umraðfestingin av teimum 200.000 krónunum var eisini einmælt samtykt.
Eisini var einmælt samtykt at broyta heitið á breiðkanini út á Grønanes til breiðkan av vegi til Niðaraveg, Gerðisveg og Grønanes.

**Viðgjørt á afturlatnum fundi:**

**Mál 81: Leigusáttmálan millum Vestmanna Arbeiðarafelag og Vestmanna kommunu**

**Mál 82: Umsókn um keyp av Kolastykkinum**

Fundur lokin kl. 18:20